# Tá bakdyrnar verða høvuðsdyr

**Broytingarnar í Klaksvík í hesum døgum fær hugin at reika.**





HUGLEIÐING
*Símun Absalonsen*

Nøkur búpláss í Føroyum hava eiði. M.a. Klaksvík, Eiði, Viðareiði, Svínoy, Hvalba og Vágur. Heilt frá landnámstíðini hava slík "eiði" drigið niðursetufólk til sín. Í mongum førum kundi sjógvurin søkjast frá tveimum síðum. Lagaði ættin tað so at brim var øðrumegin eiðið, so kundi tað vera kyrra hinumegin. Tað var ein fyrimunur at hava tvírøddan sjógv, sum tikið varð til.

Á Viðareiði og Svínoy kann havið vísa tenn frá báðum síðum, men klaksvíkingurin veit frá barnsbeini av, at Borðoyavík og Vágin eru sera ymiskar av lyndi.

Vágin er ikki bundin av kenslulagi náttúrunar. Hon er hin trygga skipahavnin, sum veitir framúr karmar fyri vinnuligum gróðrarlíkindum, uttan at neyðugt hevur verið fyrst at nýtt milliónir til grótkast og brimverju. Tann prúða Kunoyggin stendur sum verja – høg og breið - og bjóðar havalduni av.

Øðrvísi er á Borðoyavík, ella á "Víkini", sum hon ofta verður rópt á staðbundnum máli. Í logn er hon eitt hugtakandi prýði. Ein ótømandi kelda til íblástur hjá listafólki, tí Víkin kann leika á nógvum streingjum. Morgunroðin ella vetrarkvøld í mánalýsi. Víkin prýðir. Viðalundin úti í Grøv hevur ikki minkað um alskin til Víkina.

Eitt vakurt summarkvøld í Klaksvík er lív á og framvið Víkini – ein dreymaverð fyri ung og eldri. Her við sjóvarmálan bygdu klaksvíkingar svimjihyl fyri øld síðan. Og framvið Hellisenda – innast á Víkini – hava ungir klaksvíkingar svomið dúgliga. Ein teirra framdi seinni stórt mandómsbragd í svimjing í samband við skipsvanlukku. Bjargingarbáturin "Ziska" hjá Norðoya Bjargingarfelag er uppkallað eftir manni, ið átti mangan svimjivørrin framvið Hellisenda.

Men tá brimið á Víkini leikar er Klaksvík fegin um, at hon eigur Vánna, ið treyðugt letur seg ávirka av náttúrunar lúnsku kreftum.

Nólsoyar Páll hevði Vánna í huga tá hann á sinni býtti festið úti á Oyri um við myrkjanoyrafestið. Hann hevði eisini heimshøvini í huga. Í dag situr floksfelagi mín frá fólkaskúlanum Archibald Black við myrkjanoyrafestinum. Listamaðurin er eftirkomari Nólsoyar Páls í 6. liði.

"Jeg elsker havet" segði svenska Aina Cederblom, tá hon fyri mansaldri síðani avgjørdi, at vevskúli hennara skuldi liggja úti í Grøv. Cederblom kleiv heimshøvini í lítlum báti, men setti prýðiligan varða eftir seg framvið Víkini.

Týdningarmesta flutningsleið føroyinga frá gamlari tíð var sjógvurin. Sjógvurin knýtti búplássini saman. T. d. vóru Mikladalur og Gjógv "grannabygdir". Men nú oyggjar og búpláss eru bundin saman við vegum og tunlum er alt broytt – og í Klaksvík er hetta meira sjónligt enn nakrantíð áður.

Vágin var frá gamlari tíð høvuðsdyrnar til Klaksvíkar. At fremmand leitaðu sær til Klaksvíkar eftir Víkini var meira óvanligt, men tað hendi kortini. Klaksvík hevði sjálvandi einar bakdyr, sum serliga svínoyingar og fugloyingar nýttu.

"Norður í Vág" ella "Inn í Bø", eru gomul orðafelli ið nýtt vórðu aðrastaðni, tá farast skuldi til Klaksvíkar. Fyrra orðafelli varð altíð nýtt um høvuðsdyrnar, seinna orðafelli varð stundum nýtt um bakdyrnar. Tað er ikki øld síðani at plássið fekk navnið Klaksvík. Tað sigst at fremmandir ikki altíð dugdu at skilja ímillum skipahavnirnar "Suðuri í Vági" og "Norðuri í Vági". Fyri at beina misskiljingar burtur fekk norðara Vágin navnið Klaksvík.

29. apríl 2006 verður ein varði í býarsøguni. Og eftir henda dag verður mangt øðrvísi. Høvuðsdyrnar verða fluttar har sum bakdyrnar í øldir hava staðið. Víkin og stabbin á Hellisenda verður nú tað fysta ið gestsins eygað skoðar, tá leita verður til Klaksvíkar. Vakrari móttøku kann Klaksvík neyvan bjóða.

Men 29. apríl merkir ikki bert broyting í ferðsluni, men eisini mentanarliga og søguliga. Sjálvur sleit eg barnaskógvarnar Norðuri í Vági og har stóð vøggan. Eg má tí við sorgblídni ásanna, at tíðir broytast.

# Politiski kvinnubólkurin mist tolið

**Kjakið gekk dúgliga á fundinum í Eynduni á Oyrarbakka í gjárkvøldið, ið var fyri kvinnum, sum stillaðu upp til seinasta kommunuval. Evnið á fundinum var uppgávubýtið millum land og kommunu**

POLITIKKUR
*Rúna Sivertsen*
*runa@kallnet.fo" runa@kallnet.fo*

Nevndin, sum Hans Pauli Strøm, landsstýrismaður, setti at arbeiða fyri at økja um kvinnurnar lut í politikki, er framvegis óvirkin. Og nú hevur Politiski kvinnubólkurin mist tolið, og hevur gjørt av at fara aftur til verka við eitt nú at skipa fyri evnisfundum.

Endamálið við fundunum er at eggja kvinnum at fara upp í politikk og at skipa fyri upplýsandi fundum um politisk viðurskifti.

Bólkurin er mannaður við teimum trimum kvinnunum á tingi, umframt umboðum fyri hinar politisku flokkarnar.

Evnið á fundinum í gjárkvøldið var "Uppgávubýtið millum land og kommunu".

Eyðun Christiansen, ráðgevi hjá Føroya Kommunufelag, var fyrstur á skránni. Hann greiddi frá um tann fíggjarliga partin hjá kommununum. Síðani tosaði Ingibjørg Berg, aðalskrivari hjá Kommunsamskipan Føroya, um tann politiska partin. At enda tosaði Jacob Vestergaard, landsstýrismaður við kommunumálum, um kommunalpolitisku støðuna og ætlanum við uppgávubýtinum millum land og kommunur.

Orðstýrari á fundinum var Marjun í Kálvalíð.

Eftir ein lítlan kaffisteðg var kjak á skránni. Kvinnurnar høvdu nógv á hjarta, og kjakið var sera lívligt og áhugavert.

Einar 30 – 40 kvinnur vóru á hesum fundinum, sum er tann fyrsti síðani seinasta kommunuval.

Fundurin var ætlaður øllum teimum kvinnum, sum stillaðu upp til kommunuvalið í 2004.

Av teimum 250 uppstillaðu eru 51 valdar og sita í dag í bý- og bygdaráðunum kring landið. Seks av teimum eru borgarstjórar.

Politiski kvinnubólkurin sá dagsins ljós eftir eitt seminar á Hotel Føroyum í september mánaða fyrrárið. Semanrið var fyri kvinnuligar tinglimir í útnorðurlondum, og var tað fyrsta av sínum slagi.

Í tilráðinging hjá Útnorðurráðnum í 1999 varð samtykt at styrkja tað kvinnupolitiska samstarvið. Hetta skuldi gerast við at halda regluligar evnisfundir fyri kvinnuligar tinglimir og øðrum, sum arbeiða við javnstøðu. Samtykt varð, at kvinnuseminar skuldu haldast annað hvørt ár, og verður næsta seminarið í Grønlandið fyrst í juni mánað í ár.

Politiski kvinnubólkurin ætlar at skipa fyri fleiri slíkum fundum. Eitt av evnunum verður nýggja vallógin. Næsti fundur verður tíðliga og heyst, og verður hann fyri øllum kvinnum, sum hava áhuga.



*Jacob Vestergaard, landsstýrismaður við kommunumálum, Eyðun Christiansen, ráðgevi hjá Føroya Kommunufelag og Ingibjørg Berg, aðalskrivari hjá Kommunsamskipan Føroya*



*Evnið á fundinum á Oyrarbakka í gjárkvøldið var "Uppgávubýtið millum land og kommunu". Kvinnurnar høvdu nógv á hjarta, og kjakið var bæði lívligt og áhugavert*